## Ísurin fer við vindinum



Vísindamenn í Japan vilja nú vera við, at tað er ikki bara hitin, sum ger, at ísurin við Norðpólin er minkaður tey seinnu árini. Teirra kanningar vísa, at vindurin hevur nógv størri ávirkan á ísin, enn fólk geva sær far um. Japonsku vísindamenninir hava samanborið vindviðurskiftini og ísviðurskiftini kring Norðpólin tey seinastu 30 árini, og úrslitið er týðiligt, siga teir. Tað vísir, at bæði um summarið og um veturin fer nógvur ísur við vindinum suður ímillum Grønland og Svalbard og út í Norðuratlantshavið.

## Kunnu ikki selja fílabein

ST hevur havnað einari umsókn frá stjórnini í Tanzania, sum vildi sleppa at selja 90 tons fílabeini, sum landið hevur liggjandi á goymslu. Í umsóknini vísti stjórnin á, at fílastovnurin í Tanzania er vaksin úr 55.000 fílum í 1989 til næstan 137.000 í dag, og at tað tí er neyðugt at taka eitt sindur burtur av stovninum. Tað kann stjórnin gera, men hon sleppur ikki at selja fílabeinið av landinum, sigur ST. Tanzaniska stjórnin hevði væntað at fáa umleið 150 milliónir krónur fyri fílabeinið, skrivar AP.

# Bíligar tryggingar og bíligar ferðir til limir í fakfeløgum

**Arbeitt verður nú við at gera eina skipan, sum gevur fakfelagslimunum í Samtaki avsláttur, tá ið tey keypa vørur og tænastur av ymsum slagi og fyrsta avtalan eru longu fingin í hús**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað skal loysa seg at vera limur í einum fakfelag.

Tað hevur leingi verið herrópið hjá Føroya Arbeiðarafelagi, eins og hjá nógvum øðrum fakfeløgum.

Men á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, fingu hesi herrópini ein nýggjan týdning.

Tí umframt fyrimunirnir av sáttmála um minstuløn, tryggingum av ymsum slagi, eftirlønarskipanum og øðrum sosialum skipanum, skulu limirnir í Samtaki nú eisini hava ítøkiligar fíggjarligar fyrimunir av limaskapinum.

Samtak er ein felagsskapur, sum Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Fiskimannafelagið hava stovnað og sum bæði arbeiðarafeløgini í Klaksvík, nú eisini eru komin upp í.

Sostatt eru nú útvið 8000 limir í Samtaki.



*Teir útvið 8000 limirnir í Samtaki fáa nú avsláttur tá ið teir keypa frá handlum og øðrum tænastuveitarum. Eitt nú fáa teir bíligar tryggingar, bíligar ferðir við Norrønu og ætlaniner eisini at útvega teimum bíligar teldur*

### Avsláttur frá handlum og fyritøkum

Og á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag fortaldi samskiparin í Samtaki, Sonja Jógvansdóttir, at nú verður arbeitt at gera avtalur við fyritøkur og handlar av ymsum slagi um at geva limunum í Samtaki avsláttur, tá ið teir keypa.

Í hesum sambandi verður arbeitt við at útvega øllum limunum eitt Samtak kort til limirnar í Samtaki og sum gevur rætt til avsláttur.

Fyrsta avtalan er komin í hús og hon er við tryggingarfelagið Trygd, har limirnir í Samtaki nú fáa 15% í avsláttri av teimum privatu tryggingum, teir hava í Trygd.

Arbeitt verður eisini at útvega limunum góð tilboð upp á teldur og góð tilboð upp á at ferðast og somuleiðis verður arbeitt við at fá avtalur við handlar og tænastuveitarar av øllum handa slagi.

Samráðst verður eisini við Smyril Line um eina avsláttarskipan upp á bólkaferðir, tá ið limir í Samtaki ætla sær at ferðast.

Í sama viðfangi verður somuleiðis samráðst við Smyril Line um eitt gott tilboð upp á eina Samtak ferð, sum skal vera einaferð um ári, har tað ber til at halda skeið ella skipa fyri øðrum tiltøkum umborð.

Hetta tiltakið hjá Samtaki fekk sera góða undirtøku frá fundarfólkinum.

# Fólk við menningartarni økja trivnaðin á arbeiðsplássum

TÍÐINDASKRIV
*Javni*

Royndir hjá svenskum fyritøkum vísa, at trivnaðurin hækkar og sjúkradagarnir fækkast á arbeiðsplássum, har fólk við menningartarni eru í starvi. Tað segði svenski eldra- og heilsumálaráðharrin, Maria Larsson, tá hon setti eina norðurlendska ráðstevnu um ST sáttmálan um rættindi einstaklinga við breki, sum varð hildin í Stokkhólmi seinasta vikuskifti

Maria Larsson eldra- og heilsumálaráðharri í Svøríki greiddi millum annað frá góðu royndunum hjá fleiri svenskum fyritøkum, sum hava fólk við menningartarni í starvi.

Eitt nú, setti stóra svenska matvøru handilsketan ICA sær fyri nøkrum árum síðani fyri at seta fólk við menningartarni í starv. Tað byrjaði við, at Kenneth Berntson, stjórin fyri hesi stóru handilsketu, var í einum sjónleikahúsi og sá fólk við menningartarni framføra. Hann var so hugtikin av framførslum teirra og fór at hugsa um í hvønn mun hesi fólkini kundu verið við til at ríka fyritøku hansara. Síðani fór hann miðvíst í holt við at seta fólk við menningartarni í starv í fyritøkuni. Byrjað varð eitt nú við reklamuátøkum, har menningartarnað tóku lut. Nú hava tey 50 fólk við menningartarni í starvi – og málið hjá teimum er at koma heilt upp á 500 – 1000 starvsfólk við menningartarni. ICA handilsketan er ein av størstu smásølufyrtøkum í Skandinavia við umleið 2200 handlum í Svøríki, Noregi og baltisku londunum.

Aðrar fyritøkur í Svøríki hava eisini við góðum úrsliti tikið fólk við menningartarni í starv, eitt nú MAX Hamburger Restaurant. Eisini ein modellskrivstova í Stokkhólmi hevur sett sær fyri at nýta fólk við menningartarni í starv. Modellini hjá teimum hava øll eitthvørt menningartarn.

Royndirnar eru, at trivnaðurin batnar og sjúkradagarnir fækkast á arbeiðsplássum, har fólk við menningartarni eru í starvi.

Eftir grein 27 í ST – sáttmálanum um rættindi einstaklinga, sum bera brek, eiga menningartarnað at hava møguleika at arbeiða á jøvnum føti við onnur; tað fevnir eisini um rættin at vinna til lívsins uppihald. Limalondini skulu verja og virka fyri, at rætturin til arbeiði verður framdur, við at taka hóskandi stig, eisini gjøgnum lóggávu, til millum annað, at:

**a.** banna mismun vegna brek í sambandi við øll mál, sum viðvíkja arbeiði, eisini treytir í sambandi við at útvega fólk, starvssetan og arbeiði, framhald í arbeiði, framflyting í arbeiði og trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskifti.

**b.** verja rættin hjá fólki, sum bera brek, til - á jøvnum føti við onnur – rættvís og gagnlig arbeiðsviðurskifti, harímillum javnbjóðis møguleikar og somu løn fyri arbeiði við sama virði, trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskifti, harímillum verju fyri happing og uppreisn fyri vanbýti.

**c.** tryggja, at fólk, ið bera brek, eru før fyri at gagnnýta síni arbeiðs- og fakfelagsrættindi á jøvnum føti við onnur.

**d.** geva fólki, sum bera brek, møguleika at hava veruliga atgongd til almenna, tøkniliga og vinnuliga lærlingaútbúgving, starvsvenjingartilboð og vinnu- og framhaldsútbúgving.

**e.** virka fyri starvsmøguleikum og framflyting í arbeiði fyri fólk, ið bera brek, á arbeiðsmarknaðinum og hjálpa teimum at finna, útvega sær, halda fast um og venda aftur til arbeiði.

**f.** virka fyri møguleikum til sjálvstøðugt vinnuvirksemi, ígongdsetaravirksemi, at menna samvinnufeløg og at fara undir egið virki.

**g.** seta fólk, ið bera brek, í alment starv.

**h.** virka fyri, at fólk, ið bera brek, verða sett í starv í privatum virkjum gjøgnum hóskandi politiskar ætlanir og tiltøk, sum kunnu vera skipaður fyrimunur, tileggjan og onnur tiltøk.

**i.** tryggja, at hampuligar umstøður verða veittar fólki, ið bera brek, á arbeiðsplássinum.

**j.** virka fyri, at fólk, ið bera brek, fáa royndir á tí opna arbeiðsmarknaðinum.

**k.** virka fyri, at fólk, ið bera brek, fáa endurmenning í síni vinnu ella yrki, fáa varðveitt sítt arbeiði og fáa skeið til tess at kunna sleppa aftur í arbeiði.